


# Minh Doky aftur á skránni

*Í fjør skuldi heimskendi bassleikarin vitja í Føroyum saman við Sanne Salomonsen, tí saman høvdu tey gjørt kendu fløguna, sum hon sang úr. Hann kom tó ikki, men nú hevur hann aftur givið fløgu út*

Dagfinn Olsen

Chris Minh Doky gav í gjár út nýggja fløgu.

Hetta er fyrsta fløgan, eftir samstarvið við Sanne Salomonsen, ið førdi til sera væleydnaða fløgu, sum hon eisini sang úr á Jazzfestivalinum í fjør.

Tá skuldi heimskendi danin Chris Minh Doky eisini vera við í Føroyum, men honum barst frá. Sum skilst, hevur hann tó ikki mist áhugan fyri at vitja hendavegin.

Nýggja fløgan hjá Doky eitur Listen Up!. Longu nú kann ein ogna sær hana, um ein leitar sær á heimasíðuna www.doky.com

Talan er um eina fløgu, har Chris granskar tann meira funk kenda jazzin.

Hann hevur eisini leitað fram eina ljóðmynd, ið setur lurtaran í miðjuna á orkestrinum.

Kend fólk eru við, umframt Chris sjálvan. Mangir av tónleikarunum eru millum teir fremstu í heiminum í dag. M.a. eru við Larry Goldings - B3 orgel & piano, George Whitty - rhodes & keyboards, Adam Rogers - ak. & el. guitar, Louis Winsberg – ak. guitar & sitar, Clarence Penn - trommer, & special guests:, Kenny Garrett - alto sax. John Scofield - guitar, Randy Brecker - trumpet, Makoto Ozone - piano, Katreese Barnes - sang.



# Malan gjørt fløgudreym til veruleika

*Hóast Malan Thomsen er av kendastu røddum í landinum og er á óteljandi fløgum, so hevur hon ikki givið út sjálv áður, men í næstu viku kemur hon við egnari fløgu*

Dagfinn Olsen

Hon er av kendastu sangarum í landinum. Seinastu mongu árini hevur hon virkað við á óteljandi fløgum og upptøkum annars. Og hon spennur líka frá rock tónleiki til tónleik til børnini. Stutt sagt, ein av best umtóktu sangarinnum, ið vit eiga.

Malan Thomsen hevur ríkað føroyska tónleikapallin, og serliga upptøkusavnið, seinastu mongu árini, men ongantíð hevur hon sjálv givið út.

Nú roynir hon seg við egnari fløgu og hon dylir ikki, at hetta er gamal dreymur, ið nú gerst veruleiki.

Tónleikaparið Malan Thomsen og Finnur Hansen hava nú saman produserað eina fløgu við Maluni. Finnur hevur, umframt at produserað, verið tónleikari og hevur eisini sitið við knøttarnar í Jak-Zach Studio. Talan er um føroyskan popptónleik og tey standa sjálvi fyri útgávuni.

Fleiri kend nøvn eru við og millum teirra, ið hava skrivað løg, eru Finnur Hansen, Kim Hansen, Kári Jacobsen og Niclas Johannesen. Hesir báðir síðst nevndu hava eisini skrivað orð. Sjálv hevur Malan eisini sett orð saman til løg á fløguni.

Fløgan kemur væntandi hósdagin.



*Tey syngja kór til eitt lag: Anders, Malan, Kim og Lena*

# Gott er góðum at tæna

*Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út evnishefti, ið er lagað til bókina Bíblian í orðum og myndum. Hetta er undirvísingartilfar í kristni til miðdeildina*

Dagfinn Olsen

Í 1996 gav Bókadeild Føroya Lærarafelags út Bíblian í orðum og myndum. Føroya Skúlabókagrunnur hevur nú givið út evnishefti til hesa bók - Gott er góðum at tæna 1.

Hetta er ætlað til undirvísing í kristni í miðdeildini. Lærarahefti er eisini, ið hevur uppgávur og uppskot um verkevni og um, hvussu drama/leikur kann verða nýtt í kristniundirvísingini. Paulina Andreasen og Charlotta Thorsteinsson hava lagt til rættis.

Bíblian í orðum og myndum er grund undir heftinum. Dentur verður lagdur á at viðgera hesar tekstir væl, so næmingar betur skilja hendingar í Bíbliuni, at teir læra at kenna støðini, har hendingar fara fram og at teir læra teir ymsu persónarnar í Bíbliuni betur at kenna.

Harafturat er fjølbroytt tilfar til tekstir úr øðrum bókmentum at tosa um siðalagsligar spurningar, eitt nú øvund, at lúgva, stjala og slatra. Evnini eru sostatt lýst bíbilskt og verðsliga.

Gott er góðum at tæna 1 bjóðar til, at næmingar bæði fáa høvi at uppliva, lurta, samtala, samarbeiða, hugsa og nýta kreativ evni.

Hestprent hevur staðið fyri satsi, umbróting, repro og prenti.

Evnisheftið er 60 síður og kostar 48 krónur.

Læraraheftið er 16 síður og kostar 36 krónur.



*Gott er góðum at tæna 1 bjóðar til, at næmingar bæði fáa høvi at uppliva, lurta, samtala, samarbeiða, hugsa og nýta kreativ evni*



# Meirilutin verður breiður

*Løgmaður fegnast um, at veljarakanningin sýnir meriluta fyri fullveldisætlanini. Hóast meirilutin nú er tepur, væntar hann stóran meiriluta, tá sáttmálin fyriliggur*

John Johannessen
úr Keypmannahavn


*Løgmaður ásannar, at málið um evruna tekur nógva tíð og orku frá donsku stjórnini. Tí kann henda, at hetta fer at draga samráðingarnar út*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

**Føroyska Viðskiftastovan, hóskvøld:** – Nýggja veljarakanningin er fín fyri landsstýrið. Tá hugsað verður um, at fólk hava tikið støðu út frá støðuni beint nú meðan ræðumyndirnar fyri fullveldisætlanini javnan eru frammi, síggi eg meirilutan sum stóran.

Løgmaður sigur, at tá meirilutin fyri fullveldisætlanini er 45,5 prosent, meðan tey, ið eru ímóti telja 44,8 prosent, merkir hetta, at nógv tann størsti parturin av føroyingunum at enda fer at taka undir við fullveldisætlanini.

– Vit skulu minnast til, at fullveldisætlanin beint nú er í einum aldudali. Andstøðan í Føroyum og somuleiðis danskir politikarar hava seinastu tíðina ført nógv fram, ið hevur rætt fólk frá at taka undir við fullveldisætlanini. Tí haldi eg avgjørt, at vit kunnu siga handan meirilutan at vera stóran.

Anfinn Kalseberg sigur seg vera vísan í, at meirilutin fyri ætlanini fer at vaksa so hvørt landstýrið og danska stjórnin koma víðari í samráðingunum. Hann vísir á, at fólk ikki hava so nógv at taka støðu til beint nú, tí landstýrið hevur ikki nakað annað ávíst at vísa á, enn uppritið.

### Ætlan landstýrisins er tann besta

Í áliti til landsstýrið um uppritið til samráðingarnar halda Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin ætlan landstýrisins vera ov víðgongda, og tí taka teir ikki undir við henni. Teir mæla í staðin til ein sáttmála, ið leggur upp til, at føroyska sjálvstýrið verður víðkað so liðandi, við at vit taka yvir ávísu málsøkini, so hvørt vit eru før fyri tí.

Báðir teir stóru andstøðuflokkarnir siga seg nevniliga ynskja víðkað sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

Hetta halda nógvir føroyingar sambært veljarakanningini eisini vera skilabest. Tað eru nevniliga 53,81 prosent av vejarunum, ið siga seg halda, at tað ber til at fáa víðkað sjálvstýrið innan fyri ríkisfelagsskapin.

Men heldur ikki hetta ræðir løgman. Hann vísir eins og áður á, at fólk ikki hava nakað ítøkiligt at taka støðu til, fyrr enn ein sáttmáli liggur á borðinum, sum úrslit av samráðingunum.

### Vónar skjótar samráðingar

Anfinn Kalsberg sigur seg vóna at samráðingarnar fara at ganga bæði skjótt og væl. Men hann ásannar, at málið um evruna tekur nógva tíð og orku frá donsku stjórnini. Tí kann henda, at hetta fer at draga samráðingarnar út.

Hinvegin heldur hann eisini, at hetta kann skunda undir samráðingarnar. Hann vísir á, at tað jú kann henda, at danir kíta seg fyri at fáa avgreitt fullveldismálið, so orkan kann nýtast til málið um evruna.

# Ríkisveitingin størstan áhuga

*Hvat ríkisveitingin til Føroya verður brúkt til hevur størstan áhuga millum vanligar danir í sambandi við samráðingarnar um føroyskt fullveldi*

John Johannessen
úr Keypmannahavn

Áhugin fyri fullveldisætlanini hevur verið stórur í Danmark síðani flogfari við løgmanni og teimum fimm landstýrisfólkunum, Høgna Hoydal, Helenu Dam á Neystabø, Karsteni Hansen, Signari á Brúnni og Jørgeni Niclasen lendi á flogvøllinum í Kastrup seinnapartin hósdagin.

Løgmaður og Høgni Hoydal hava báðir verið gestir hjá donskum sjónvarpsstøðum, har teir hava greitt frá fullveldisætlanini. Hóskvøldið var løgmaður gestur í sendingini Deadline hjá DR2 og fríggjamorgunin var Høgni Hoydal saman við fastur sínari, Anniku Hoydal, gestur í morgunsendingini Go' morgen Danmark hjá TV2.

### Hvar fer blokkurin?

Spurningurin, ið gongur aftur, bæði tá føroyskir politikarar eru at hoyra í donskum fjølmiðlum og tá føroysku fjølmiðlarnir tosa við danan á gøtuni er, hvat ríkisveitingin verður brúkt til í Føroyum og um danir fáa nakað aftur av hesi peningaupphædd.

Tá løgmaður og Høgni Hoydal hava fingið hendan spurningin í donskum fjølmiðlum, hava teir greitt frá, at partur av fullveldisætlan landsstýrisins er, at Føroyar skulu gerast búskaparliga óheftar av Danmark.

Men fáast skal í lag ein búskaparlig skiftistíð, ið tryggjar føroyska búskapin fyrstu árini eftir, at Føroyar eru vorðnar sjálvstøðug tjóð. Hetta tykist vanligi danin á gøtuni ikki at skilja. Greiði boðskapurin úr Danmark er, at skulu føroyingar valda, mugu teir eisini gjalda. Teir síggja onga orsøk fyri, at danir framhaldandi skulu senda føroyingum pening, tá teir ikki longur eru partur av danska ríkinum.

Hesar hugsanir nerva kortini ikki landsstýrið. Landsstýrisfólkini siga seg øll hava væntað hesar útmeldingar. Tey vísa á, at tá hol veruliga er sett á samráðingarnar, verður støðan ein onnur.

### Bondini verða ikki kvett

Í sendingini Go' morgen Danmark vórðu Høgni Hoydal og Annika Hoydal millum annað spurd um, hví føroyingar brádliga ynskja at kvetta tætt knýttu bondini við Danmark.

Svarið til hendan spurning var tað sama, sum Høgni Hoydal fleiri ferðir hevur borðreitt við í Føroyum. Bondini skulu ikki kvettast. Harafturímóti skulu Føroyar og Danmark víðka um samstarvið landanna millum. Men talan skal vera um tvær sjálvstøðugar tjóðir.

Flestu danir siga seg heit greitt duga at síggja, at neyðugt er við tøttum samstarvi millum hesi bæði lond. Serliga hugsa danir um, at Føroyar hava brúk fyri Danmark, tá tað ræður um víðari útbúgvingar og heilsuverk. Men eisini duga nakrir danir væl at síggja, at Danmark eisini hevur havt fyrimunir av Føroyum. Í hesum sambandi verður millum annað tosað um hernaðarstøðir hjá NATO í Føroyum.

Men kortini vísa danir á, at tað hevur verið ein trygd hjá Føroyum at havt hesar hernaðarstøðir. Var NATO ikki í Føroyum, var kanska onkur annar har, siga eygleiðararnir frá donskum fjølmiðlum, Sosialurin hevur tosað við.

Danskir fjølmiðlar ætla at fygja væl við ríkisrættarligu samráðingunum, hóast nógv orka fyri tíðina verður brúkt til málið um evruna.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL — Sýnaður 04-98
Skrás.: 02-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 218.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,6 H/B GINZA — Sýnaður 04-96
Skrás.: 30-04-96
Km.: 34.000
Prísur: 112.600,- Garanti*

TOYOTA CAMRY 2,2 XL — Sýnaður 10-98
Skrás.: 21-12-91
Km.: 80.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 Xli H/B — Sýnaður 10-96
Skrás.: 31-10-96
Km.: 35.000
Prísur: 108.600,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOLPLUS — Sýnaður 12-98
Skrás.: 23-12-98
Km.: 15.000
Prísur: 208.600,- Garanti**

TOYOTA PREVIA 2400 BENZIN Gli — Sýnaður 03-98
Skrás.: 12-94
Km.: 58.000
Prísur: 114.000,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Sli SEDAN — Sýnaður 03-00
Skrás.: 08-94
Km.: 79.000
Prísur: 106.000,- Garanti*

FIAT PUNTO 60 S — Sýnaður 01-97
Skrás.: 30-01-97
Km.: 42.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 STATION — Sýnaður 02-99
Skrás.: 18-06-90
Km.: 59.000
Prísur: 59.600,-

FORD FIESTA 1,3 — Sýnaður 04-96
Skrás.: 29-04-96
Km.: 104.000
Prísur: 66.600,-

TOYOTA CARINA II Xli SEDAN — Sýnaður 02-00
Skrás.: 02-92
Km.: 194.000
Prísur: 55.000,-

NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR — Sýnaður 12-99
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN — Sýnaður 02-96
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,- Garanti*

Støkkið inn á gólvið!

AVHEINTINGARTILBOÐ

TOYOTA CAMRY 2,0 Xli AUTOM.
Skrás.: 22-10-87
Km.: 205.000
Prísur: 15.000,-

HONDA ACCORD EX — Sýnaður 06-99
Skrás.: 08-86
Km.: 214.000
Prísur: 15.000,-

HONDA CIVIC 1,5 — Sýnaður 12-98
Skrás.: 01-06-86
Km.: 175.000
Prísur: 12.000,-

TOYOTA CAMRY 1,8 XL — Sýnaður 11-97
Skrás.: 28-01-87
Km.: 197.000
Prísur: 10.000,-

VØRUVOGNUR

MITSUBISHI PAJERO VAN — Sýnaður 06-99
Skrás.: 05-10-95
Km.: 85.000
Prísur: 138.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

Sosialurin - 311820

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00



Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040